# Roskilde Festivalurin er útseldur

Aftur í ár eru øll atgongumerkini til Roskilde Festivalin útseld. Festivalurin boðar frá at 75.000 fólk úr fara at leita sær á festivalin. Hóast øll atgongumerkini eru seld, so er enn møguleiki at sleppa á festivalin, sunnudagin 8. juli, tá verða eindagsatgongumerki seld. Umframt at øll, ið eru yvir 60 ár sleppa ókeypis inn hendan dagin við at skjalprógva aldurin. Festivalurin heitir á fólk, ið eru ov sein at keypa atgongumerki, um ikki at keypa frá óalmennu sølustøðunum. Tí hesi kunnu vera følsk, og tú fært ikki peningin aftur fyri eitt falskt atgongumerki.



# Á Asfalt koyrir tað!

Asfalt hevur seinastu tíðina skipað fyri eini kapping á myspace síðu síni, um at finna eitt slagorð til tónleikatiltakið í Tórsgøtu. Fleiri góð uppskot vórðu send inn, og í gjár vórðu tey trý bestu vald. Slagorðið 'Á Asfalt koyrir tað!' hjá Bjarna Dahl vann framman fyri 'Asfalt - tín vegur til tónleikin' hjá Gunn Reinert og 'Asfalt - 100% føroyskt' hjá Astrid Mohr. Øll tey trý fremstu í kappingni vóru úr Tórshavn. Til ber at síggja øll sloganini, ið komu inn á www.myspace.com/asfaltfo. Asfalt er í Tórsgøtu komandi vikuskiftið.

# rstreet



*Týr spældu sín eyðkenda kvæðarokk beint inn í føroysku hjørtuni*
*mynd: Niels Uni Dam*



*BoysInABand: Boys In A Band vóru, sum vant ein sprell livandi uppliving*
*Mynd: Niels Uni Dam*



*Týr spæla við orku og sannføring og tað sæst, at teimum dámar hetta.*
*Mynd: Niels Uni Dam*

farin fyrst á pall og Týr kundi endað tiltakið. Hetta hevði gjørt heildarupplivingina betri, og hevði ivaleyst eisini gjørt upplivingina hjá Petur Bén og Boys In A Band betri.

### Christiania var einasti møguleikin

Náttarlívið millum føroyskar útisetar í Keypmannahavn hevur í nógv ár verið savnað um nøkur fá ávís støð. Føroyahúsið hevur verið fast stað í nógv ár, meðan støð sum gamla Gimlé á Islandsbrygge, Skarv, Jaques og Laurits Betjent hava í styttri ella longri tíðarskeið savnað nógvar føroyingar. Trupult hevur verið hjá nýggjum støðum at fáa fótafesti, og royndir við tiltøkum á støðum sum á Norðuratlantsbryggjuni, nýggja mentanarhúsinum í Islandsbrygge, Nørrebrohallen og Amager Bio hava havt heldur avmarkaða eydnu. Seinasta árið hevur serliga Skarv verið miðdepilin í føroyska náttarlívinum í Keypmannahavn og høvuðsorsøkin fyri hetta er Edmund Sofus Jacobsen, ið skipar fyri tónleikinum á Skarv. Edmund arbeiðir burturav við at fyriskipa tónleikatiltøk í Keypmannahavn og tað var eisini hann, ið skipaði fyri tiltakinum í Operaen á Christiania leygardagin. Hann sigur um orsøkina, til at tiltakið endaði á Christiania :

- At Operaen bleiv staðið leygarkvøldið, var tí at onki annað høli í Keypmannahavn var tøkt. Men hetta var ikki ein burturvið avgerð, tí tiltakið var væl vitjað við yvir 350 gestum, harav mundu ivaleyst eini 300 vera føroyingar. Fleiiri av hesum komu beinleiðis úr The Irish Pub á Støgnum, har dysturin millum Føroyar og Italia var vístur á stórskíggja, og millum hesi var hýrurin sera góður. Hetta prógvar, at um skráin er nóg spennandi, so kemur fólk. Hetta hava vit eisini fleiri ferð sæð í eitt nú VEGA, har t.d. Atlantic Music Event hevur savnað nógv fólk.

### Í donskum sjónvarpi

Millum christianittar var áhugi fyri tiltakinum, og fleiri av íbúgvunum í frístaðnum vóru komnir á konsertina. Eisini sendi sjónvarpsrásin Christiania TV frá tiltakinum. Sjónvarpsstøðin sendir á Kanal København, ið sendur til meira enn eina millión møguligar hyggjarar í Keypmannahavn og rundan um. Men til ber eisini at fylgja gongdini á alnetinum. Á heimasíðuni www.catv.dk sendi kanalin beinleiðis frá tiltakinum í Operaen, og í næstum verður sendingin lagdar á heimasíðuna, at taka niður.

# Nógv nýtt og gott gamalt á Asfalt

**Nú Asfalt stendur fyri durum hevur tónleikatiltakið í Tórsgøtu almannakunngjørt eina rúgvu av nøvnum. Tilsamans 45 tónleikanøvn**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Millum hesi teljast bæði gomul og nýggj, ja, sera gomul og spildur nýggj. Stuttligt verður tildømis at uppliva Rabbits við Simma og teimum. Tey kend frá plátum, fløgum, útvarpi og sjónvarpi, eins og umvegis sítt virksemi í Tórshøll í fimtiárunum og í Havnar Klubba í sekstiog sjeytiárunum. Tað er mestsum ikki neyðugt at lýsa tey meiri nágreiniliga enn bert at nevna nøvnini: Simme, Lív Dam, Fróði Sandoy, Ólavur Øster, Leivur Johannesen, Flemming Berglind og Aggo Mouritzen. Ella hvussu við Hanus G. Johansen, ið einasmallur megnar at fylla einhvønn pall. Tað kunnu eisini seg gimsteinar handan púra ókend nøvn, sum 0 Rhesus Negativ Ford Siesta ella Jumpin' Jack. Eins og í fjør eru skráin eitt bland av kendum, ókendum, væl kendum og minni kendum nøvnum. Tónleikurin fevir um alt frá kórsangi til streingjatónleik og frá kristiligum kontri til harðan treski málm.

**Listin av bólkum er í løtuni:**

0 Rhesus Negativ
Bendar Spónir
Boys In A Band
Brama
Budam
Crawling Blue
Dánjal
Dropar
Ford Siesta
GHM
Guðrið Hansdóttir Band
Gunnar G. Guttensen
Hanus G. Johansen
Heine Lützen
Holgar og Villmenn
India
Ineptus
Jumpin' Jack
Knocklebusters
Knút Háberg Eysturstein
Kristleif
Kvonn
Lív Hansen
Magni Christiansen
Martin í Grund
Martin Joensen við Hinum
Nanoscopic
Nátt
Petur Háberg
Petur Pólson
Proclaim
Rannvá Jacobsen
SIC
Side Effect
Simme og tey/Rabbits
Steso
Synarchy
The Dreams
The Ghost
Tjant
Tórfríð Tavsen
Two Of You
Ung Stjørnuskot
Vígdis

VOX

Kunngerðirnar av Deja Vu, White Raven og Torkil Mørkøre eru tiknar aftur vegna avboð og óvæntað persónlig viðurskifti.

Á heimasíðuni Asfalt.fo ber til at lesa um allar bólkarnar.

